



Soleiðis brúki eg mínar
# PENGAR

**Eilen Anthoniussen**
eilen@sosialurin.fo



Í einum húsarhaldi við skúlabørnum er neyðugt við teldum og interneti, tí flestu uppgávurnar hjá børnunum verða innlatnar umvegis internetið. Og í eini sunnari familju sum hjá Inga Olsen, skal frukt altíð vera at finna í húsinum

**EIN FAMILJA VIÐ SJEY** limum krevur sítt. Til matpakkar og nátturða krevst eitt breyð um dagin, viðskeri, ómetaliga nógv frukt, og til transport tveir bilar, ið dagliga skulu flyta familjuna millum Vestmanna og Havn. Tilsamans koyrir familjan millum 50-60.000 kilometrar árliga. Restin av tíðini hjá Inga Olsen verður býtt millum børn og handbólt

**Myndir:** Jens Kr. Vang jensk@sosialurin.fo

Heima hjá Inga Olsen, landsliðsleikara og handbóltsvenjara, er tað handbólturin, ið fyri ein stóran part setir dagsskránna. Ingi Olsen arbeiðir í Føroya Banka í Havn. Fram til summarfrítíðina fór hann beinleiðis til venjingar hjá Neistanum, har hann seinastu tvey árini hevur verið leikandi venjari, og er hann tískil seint heima aftur um dagarnar.

Hann er annars uppvaksin í vestmannafelagnum VíF, og býr hann framvegis í Vestmanna. Konan arbeiðir eisini í Havn, og av tí at hennara arbeiði er í vaktum, er neyðugt við tveimum bilum.

- Vit hava tveir bilar. Ein Toyota Avensis og ein Peugeot 307, har av annar er diesel. Eg royni at hugsa um umhvørvið, og nýti diesel, sum ikki er meir dálkandi enn bensin. Men vit koyra nógv. Millum 50-60.000 kilometrar um árið, sigur Ingi Olsen.



## Eitt breyð um dagin

Tríggjar gentur og tveir dreingir hava Ingi Olsen og konan, Bjørg. Børnini eru í aldrinum 18, 13, 11, átta og seks ár. Tað elsta gongur í Hoydølum, trý tey mittastu ganga í fólkaskúla, og yngsta barnið gongur í dagstovni. Tískil skulu nógvir matpakkar av húsinum hvønn dag, og er breyð og viðskeri ein basisvøra í køliskápinum í Vestmanna.



- Tað fer eitt heilt breyð um dagin bara til matpakkar og kanska nátturða. Og so eru vit stórforbrúkarar av frukt, sum eisini má vera í húsinum. Vit ganga høgt upp í, at skil er í matinum, at børnini ikki fáa ov nógv góðgæti, og at tey hava góðar matpakkar við í skúla. Og tað er lætt at venja tey av við ósunnan mat. Tað er bara at lata vera við at eiga tað inni, sigur Ingi Olsen.

Ingi Olsen er 40 ár, og leikti í 21 ár á besta liðnum hjá VíF, áðrenn hann fyri tveimum árum síðan skifti til Neistan at vera venjari. Fyri at halda kroppin við líka, gongur hann høgt upp í at fáa rættan kost, sum eisini skal til tá ein spælir handbólt á høgum stigi. Hann viðgongur kortini, at hann hevur ein veikleika fyri burgarum og kips. Men tað hoyrir til undantakið.

- Tað hendir bara, tá eg ikki tími at gera mat, og tá konan arbeiðir seint fríggjakvøld. Í mesta lagi eina ferð um mánaðin. Generelt havi eg tað so, at mær dámar so illa, at maturin ikki er sunnur, til dømis pizza og grill.

## Feitt til ítróttarfólk

Heima er tað konan, ið tekur sær av allari reingerð og húsliga arbeiðnum, meðan Ingi sjálvur tekur sær av túninum. Tað er eisini konan, ið stendur fyri 90 prosent av innkeypinum, og av vikudøgunum ger hon mat umleið seks ferðir, og hann eina ferð, um hann skal meta um.

- Tað er rættiliga torført at liva vistfrøðiligt í Føroyum, eisini í Vestmanna, tí úrvalið av vistfrøðiligum vørum er so lítið. Men í tann mun tað ber til, royna vit at keypa vistfrøðiligt.

Í Vestmanna hevur familjan lætta atgongd til fisk og kjøt, og er tað tí partur av føstu matskránni.

- Vit eta nógvan fisk og seyðakjøt. Eg havi sjálvur seyð, og fisk fáa vit umleið tvær ferðir um vikuna. Tá tað kemur til kjøt, eri eg ikki serliga kræsin. Ræst kjøt og serliga seyðarhøvd, dámar mær væl. Av seyðarhøvdinum eti eg alt uttan heilan. Eg haldi, at eg sum heild sjáldan seti spurnartekin við mat. Hann skal bara vera sunnur, sigur Ingi Olsen.

Men hóast maturin sum heild skal vera sunnur, viðgongur Ingi Olsen, at nakað av feittið fer niðurum.

- Vit eta nógv seyðakjøt, og seyðakjøt er feitt. Sósin verður til dømis altíð gjørd av soðnum frá seyðakjøtinum. Tað ger okkum til forbrúkarar av feitum mati. Men vit tola tað eisini. Vit eru sera virkin í familjuni, renna og tuska nógv.

Ikki so løgið, verða børnini eisini uppfløskað í handbóltsfelagnum VíF. Tey eru øll, so hvørt tey eru vorðin nóg gomul, farin at spæla við VíF. Bara tað at røra seg, gongur familjan Olsen høgt upp í.

- Vit ferðast rættiliga nógv, og vit hava eisini eitt summarhús at fara í. Men tað hevur eisini týdning fyri okkum at sleppa burtur, at fáa luft. Náttúruna raðfesta vit høgt, og seinnu árini hava vit fingið til vana at gera túrar niðan í fjøllini. Men tá vit fara uttanlanda, skal tað vera okkurt barnavinarligt ferðamál.

## Flatskermar og góðar renniskógvar

Tað er ikki ofta, at tey øll fara út at eta. Tað kann gerast ein dýrur